# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 9.september<br>Tíð:kl 16.00 – 17.30 | | Luttakarar: Allan, Vivian, Jóhan, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt:Bjørghild og Bjørg | |
|---|---|---|---|
| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
| 1. | Fundarfrásøgnin | | AM |
| 2 | Úrslitið av landsroyndini | Ùrslitið av landsroyndini fyri 4.fl og 6.fl bleiv lagt fram. Sum heild má sigast at næmingarnir hava klára seg væl, um miðal og yvir miðal í flestu førum, tó uttan í tí eina døminum. | MH |
| 3. | Tímaniðurskurður og royndarverkætlanir | Tímaniðurskurður í grunddeild er í høvuðsheitum farin inn í tvílæraraskipanina.<br>3.flokkur hevur tó sama tímatal sum fyrr og hevur fingið nakað inn í handverk og list.<br>Dentur hevur eisini verið lagdur á at brúka ein tíma í føroyskum til floksins tíma í grunddeildini.<br><br>Tímatalið er lítið broytt í miðdeild, ein tími er skiftur um við floksins tíma á hvørjum stigi í miðdeild. Hettta verður gjørt sum nakað nýtt fyri at gera eina roynd við um trivnaðurin kann gerast betrið tá ein tími verður miðvíst brúktur til hetta endamál.<br>Umframt hetta koyrir ein verkætan, sum snýr seg um at stykja teknologiska fatan og hugsunarhátt. Hetta er gjørt sum ein roynd fyri at kanna eftir um tað er gjørligt at fanga áhugan hjá næmingum á hesum økinum.<br><br>Fyri at minka um tímatalið í hádeild er samfelagsfrøði og søga, lagt saman til 3. tímar.<br>Danskt er skorið niður við einum tíma í 7.fl og 8.fl. men 9. fl er óbroyttur.<br>Hóast hetta er dagurin í hádeildini enn ógvuliga bókligur. Týskt, alisfrøði, tónleikur og heimkunnleiki eru vallærugreinar í 8.fl og 9.fl. Tað er tó ikki altíð at tað hóskar hjá øllum, tí tað er samanrenning millum týskt og t.d. køk | MH |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4. | Serøkið | Greitt bleiv frá øllum serøkinum, hvussu tað er skipað í teimum ymsu deildunum. Hvussu tímar verða lutaðir sundur og at sertoymið er ráðgevandi í at gera tímabýtið. Skúlin skilur millum at tímar skulu brúkast til miðfirraða serundirvísing og sum serligur lærari ella stuðul inn í tann einstaka flokkin ella floksstig.<br>Tímabýtið verður gjørt eftir bestu fakligu sannføring soleiðis at serøkið fær sum mest burtur úr til næmingarnar sum hava ein tørv. | MH |
| 5 | Setnair í 2019 | Rannvá Helenudóttir er sett sum námsfrøðingur í forskúlanum.<br><br>Joan í Dímun er sett sum námsfrøðingur í 1.flokki og 4.flokki<br><br>Kathrine Keld er sett sum lærari í støddfrøði og alisfrøði<br><br>Sigrid Olsen bleiv sett inni í summarferiuni tí tað vóru nakrir avlopstímar.<br><br>Eyðbjartur og Rudi vóru sett í fast starv | MH |
| 6 | Próvtøkuúrslit | Úrslitð av próvtøkuni 2019. Tað hevði verið eitt mál við einum próvdómara í munnligu próvtøkuni hjá 9.flokki og málið var kannað av tí skúla sum hevði latið próvdómaran.<br><br>Úrslitið av skrivligu próvtøkuni bleiv lagt fram. Næmingarnir høvdu sum held klára seg væl. Yvir landsmiðal í øllum pørtum, uttan framseting sum ikki var givið út sum hagtøl. | MH |
| 7 | Ymiskt | Vit avtalu at flyta fundin til mikudag aftur .<br><br>Hesir mikudagar vóru avtalaðir sum fundardagar 30.okt, 27.nov., 29.jan., 26.feb., og 25.mars.<br><br>Skúlin skal fáa Allani til vega eitt yvirlit yvir foreldraumboðini, soleiðis at felags foreldraráðið kann hittast 23.okt. | |